*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*



**Viðmerkingar til tónleikasíðurnar? Hugskot til tónleikatíðindi?**
Skriva til sunneva@sosialurin.fo



*- Vit hava onkra ímynd av, at verðin bara fer at koma til okkum; vit eru klassiskir droymarar. Sjálvandi vita vit, at tað er bullshit, men vit vilja bara gera góðan tónleik, og tónleikur er eisini í grundini bara tað, sum vit duga, sigur Líggjas Olsen um alskin til tónleikin.*
*Mynd: Barbara Vang*

ímynd av, at verðin bara fer at koma til okkum; vit eru klassiskir droymarar. Sjálvandi vita vit, at tað er bullshit, men vit vilja bara gera góðan tónleik, og tónleikur er eisini í grundini bara tað, sum vit duga. Tað er bara reinur alskur til tónlistina.

FV: Tað er eisini nakað við, at mann er so kritiskur ímóti øllum, sum hini gera, og at mann á ein ella annan hátt avspeglar tað við sínum egna; mann setur sítt egna upp ímóti hinum. Ikki tí at mann vil vera betri, men tí at tað følist rætt at gera tað.

LO: Ja, allir tónleikarar hava eina náttúrliga trongd til at gera tónleik. Tað er væl soleiðis við øllum kreativum fólki. Ein kona, sum dugir og dámar at binda, fær okkurt burturúr at binda ein sokk. Vit fáa okkurt burturúr at skriva sangir og spæla teir. Og tað er genialt, tá tað riggar.

FV: Bara tað at skapa eitt evarska lítið ljóð í einum lagi kann geva eina fantastiska kenslu. Mann blívur so spentur. Tað er sum at gleða seg til jólapakkan, tú følir tað brúsa innaní.

**Hvussu arbeiða tit saman?**
LO: Vit kennast væl, og eg haldi, at vit hoyra tónleik øgiliga líka. Til dømis ljóð og klangir; um eg sigi »á, hatta er feitt«, so veit Flóvin beinanvegin, hvat eg meini við.

FV: Tað er næstan so galið, at vit enda setningar hjá hvørjum øðrum...

LO: Vit diskutera eisini væl um allar detaljur og hava eina felags uppfatan av tingum, samstundis sum at vit geva hvørjum øðrum mótspæl.

FV: Vit møtast í luftini. Fólk halda, at vit burdu kallað okkum »Friends Forever«!

**Hvat er tykkara drívmegi?**
LO: Alt. Allur tónleikur og yvirhøvur alt, sum ein upplivir.

FV: Sinnalagið er ógvuliga inspirerandi. Tað, tú følir, tá tú ert í góðum lag ella ringum lag. Tá veðrið er gott ella ringt. Alt tað fær ein at koyra víðari. Og so vilja vit bara gera góðan tónleik. Eg havi eina serliga trongd til at gera okkurt feitt live. At seta list saman uppá ymsar mátar og gera nakað stórt.

LO: Tú og títt teatur... eg eri kanska meira ótolin enn Flóvin. Eg vil gjarna hava tónleikin út, og tað skal ikki taka ov langa tíð. Ikki tí at mann skal stressa seg sjálvan í prosessini at gera tónleikin, men eg vil gjarna arbeiða effektivt og fáa tað út til so nógv fólk sum gjørligt. Vit hava tó ikki spælt hendan tónleikin live enn, men tað fara vit nú skjótt. Tað má tó líka venjast ordiligt fyrst. Studio er studio, men live er nakað heilt annað, og tað má gjøgnumarbeiðast ordiligt, áðrenn mann spælir konsertir.

FV: Ja,vit hava arbeitt on and off í studio nú í átta mánaðar, og tað er við at verða tíð til at koma út at spæla.

LO: Vit skulu eisini finna okkum eitt navn, men eru ikki heilt samdir enn, so tað kann ikki avdúkast beint nú. Men »Friends Forever« er í hvussu er útilukkað!

**Hoyr Líggjas & Flóvin framføra til Mind The Music konsertina á Altjóða Sálarheilsudegnum tann 10. oktober í Reinsarínum kl. 22.00**